# Porkeris skúli



---

**Ert tú ágrýtin og engageraður? Hevur tú áhuga fyri at menna læriumhvørvið á einum spennandi skúla? Kundi tú hugsað tær at arbeitt saman við dugnaligum lærarum, sum ynskja at skapa ein mennandi skúla? So er tað kanska tær, vit leita eftir.**





**Í Porkeris skúla vera 36 næmingar í 1.-7. árgangi komandi skúlaár. Á skúlanum starvast 4 lærarar, harafturat samstarva vit við Vágs skúla og eru lærarar har eisini ein partur av okkara starvsfólkahópi onkrar dagar í vikuni. Vit leggja stóran dent á ein mennandi og fjølbroyttan skúladag, tí hendir nógv spennandi í skúlanum, m.a.:**

- **First Lego League**
- **Skúlaleikir**
- **Evnisvikur**
- **Konsertir í samstarv við Musikskúlan**
- **Framførslur og framsýningar**
- **Lesivika**
- **Útferðir, hugnaløtur, spæl, sangur, rørsla, kreativitetur**

**Hevur tú hug at gerast partur av okkara starvsfólkahópi, so er bara er søkja.**





**Hetta starv verður lýst leyst at seta frá 1. august 2023:**

1 lærari í fast starv frá 1. august 2023.

**Vit vænta, at tú:**

- Ert fyrikomandi, jalig/ur og dugir væl at samstarva.
- Ert stundislig/ur, nærløgd/lagdur og engagerað/ur.
- Vilt taka á teg spennandi, avbjóðandi og mennandi uppgávur í skúlanum.
- Tekur lut í dagliga arbeiði skúlans undir ábyrgd leiðslunnar og ert við til áhaldandi at menna skúlan.
- Kanst virka sum flokslærari.

Vit sóknast eftir lærara, sum kann undirvísa í serliga handaligu lærugreinunum, føroyskum, donskum og kristni.

**Førleikakrøv:**

Læraraútbúgving.

Størvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkinum 18.1-29.2. Barnaváttan verður kravd í samband við setanina.

Meira fæst at vita um størvini frá fyrstalæraranum Beintu Gudfinnsdóttir Jacobsen á tlf. 276869.

Umsóknir, saman við c.v. og avriti av prógvum, skulu vera fyrstalæraranum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 30. juni 2023 kl. 12.

Umsóknir kunnu sendast til beinta.g.jacobsen@skulin.fo ella

**Porkeris skúli**
**Gjørðabrekka 10**
**950 Porkeri**





Les meira um skúlan á www.porkerisskuli.fo